# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kringvarp Føroya á bredda

Kringvarp Føroya er á breddanum og sum ikki einaferð orsakað av peningaligum trupulleikum. Hetta er ein gomul søga, sum endurtekur seg. Fleiri ferðir hesi seinastu tíggju árini hevur Sjónvarp Føroya, sum sjónvarpsparturin av Kringvarpinum æt, fyri sammalegging, verið í álvarsomum fíggjarligum trupulleikum og hava trupulleikarnir elvt til álvarsamar politiskar trupulleikar. Tað er soleiðis sæð einki nýtt í hesum, at samanlagda stovninum trýtur pening.

Kringvarpið - útvarp og sjónvarp, er okkara sterkasti mentanarberi og endamálið við samanleggingini var at skapa ein sterkan public service stovn, søgdu politikkararnir tá. Vit eru púra samd í, at neyðugt er við einum sterkum almennum public service stovni. Vit hava áður á hesum stað nevnt, at vit unna hesum stovni alt tað besta, og hetta vilja vit endurtaka her.

Hinvegin skal KVF metast við liberaliseringini av kringvarpsøkinum í baksýni. Tá kringvarps-løggávan varð liberaliserað fyri nøkrum árum síðani, var breið politisk semja um, at pláss skuldi verða fyri privatum útvarps- og sjónvarpsstøðum eisini. Virksemið hjá almennu rásunum skuldi fíggjast við brúkaragjaldi, nú nevnt kringvarpsgjald. Men stovninum varð eisini loyvt at hava lýsingar, og henda avgerð hevur skapt stórar trupulleikar fyri privatu støðirnar og fer eisini, sum frá líður, at skapa trupulleikar fyri KVF. Hetta hongur ikki saman. Ein almennur public service stovnur, sum hevur rætt at krevja inn skatt frá sínum brúkarum, sum fær íløgupeningin beinleiðis umvegis fíggjarlógina, sum skjótt fær nýggj hús fyri uml. 50 milliónir og sum samstundis fær loyvi at kappast við privatu støðirnar á lýsingamarknaðinum er ein andsøgn í sjálvum sær. Hon neutraliserar so at siga ta liberalisering, sum eitt samt Føroya løgting fleiri ferðir við lóg hevur lýst sum sín vilja. Her kann hóskandi verða mint á, at Løgtingið hevur í álitinum um kringvarpslógina gjørt av, at lýsingarvirksemi skal niðurlagast. Kortini styrkir Kringvarpið nú hendan táttin av virkseminum og gongur hetta sostatt beint ímóti tingsins vilja. Úrslitið av hesi gongd kann gerast, at monopolið sum á demokratiskan hátt er avsagt, heldur fram sum einki er hent. síðan Útvarp Føroya varð stovnað við einkarættti at senda.

Henda skipan er sostatt kappingaravlagandi við almennum peningi sum trygdarnet. Hetta kann ikki halda fram. Hetta er óetiskt og beinleiðis í andsøgn við alt hugsjónarstøðið undir liberaliseringini. Tingmenn og skiftandi landsstýrisfólk hava verið greið yvir hesa andsøgn. Tey hava havt fleiri myndlar á lofti, men her steðgar kortini upp. Hvørjir myndlar hava verið nevndir hesi árini? Tann mest upplagdi er at seta KVF á fíggjarlógina við tí upphædd, sum stovnurin kostar og samstundis at taka loyvið at hava handilslýsingar frá stovninum. Við slíkari skipan kann stovnurin nýta sína orku og førleikar til at framleiða sendingar samsvarandi endamálsgreinini í kringvarpslógini, heldur enn at nýta orkuna til at varðveita monopolið, at berjast ímóti privatum "kappingarneytum" og royna at týna hesar.

Hetta er tann ruddiligasta loysnin. Tað finnast nógvar millumloysnir sum t.d. at leggja kring-varpsgjaldið inn í skattin. Tað gevur nógv meira pening, men ein slík loysn má og skal innibera, at privatu støðirnar í Føroyum eins og uttanlanda fáa tillutað ein hóskandi part av hesum inntøkum. Verður hetta ikki gjørt verður skipanin uppaftur meira kappingaravlagandi, enn hon er í dag. Her er jú reelt talan um eina skattahækking, ið eigur at koma øllum økinum til góðar. Hvussu ein møguligur býtislykil skal skipast er torført at meta um, men hann skal sjálvandi leggja upp fyri tí veruleika, at KVF er okkara almenna public service rás, sum vit øll ynskja skal hava góðar umstøður.




Sosialurin

## Vaksinan, sum bjargar kvinnulívum

VÁR Í GONG
forkvinna,
Felagið Føroyskir
Sjúkrarøktarfrøðingar



Í hesum døgum er nógv frammi um eina vaksinatión, sum eftir ætlan skuldi innførast í Føroyum, men sum orsakað av manglandi pengum ikki slapp á fíggjarætlanina. Hallið á fíggjarætlanini fyri 2009 nærkast 600 mió. Hetta er sera nógvur peningur, og vit skilja øll, at onkustaðni má táttast í. Spurningurin er so hvar? Hesa avgerð vilja vit lata til tey fólkavaldu. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar vil tó staðiliga mæla til, at vaksinan, sum verjir ímóta krabbameini í lívmóðurhálsinum, verður raðfest á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2009.

**Vaksinan verjir ikki bert ímóti lívmóðurhálskrabba**

Vaksinan verjir ímóti einum virusi, HPV-virus, sum elvir til 70% av tilburðunum av lívmóðurhálskrabba. HPV virusið verður yvirført kynsliga. Vaksinan verjir eisini móti kynsvortum og ávísum øðrum sjáldsomum sløgum av krabbameini í kynsgøgnunum.

**Vaksinan er sett í verk í Danmark**

Í Danmark hevur hendan vaksinan verið eitt ókeypis tilboð frá 1. okt. 2008. Í fyrstu syftu eru tað gentur, sum eru føddar í 1993, 1994 og 1995, ið verða vaksineraðar ókeypis. Frá 1. jan. 2009 umfatar tilboðið eisini gentur føddar í 1996. Mælt verður til, at føroyskar gentur sjálvandi fáa sama tilboð, sum tær donsku.

Tað ljóðar, at meiriluti er í løgtinginum fyri at seta vaksinatiónina í verk, og er tað okkara vón, hóast talan er um eitt andstøðuuppskot, at tingfólk standa saman og atkvøða fyri hesu lívbjargandi vaksinu.

Tilber at lesa meiri um HPV-virusið og vaksinuna á heimasíðuni hjá Sundhedstyrelsen www.stophpv.dk

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.